

## Keane klárur aftur at venja

Roy Keane er til reiðar at taka eina nýggja venjarauppgávu á seg í summar. Beint fyri jól gavst Keane í starvinum í Sunderland, og síðani hevur hann ikki viljað tikið við nøkrum nýggjum starvi, hóast hann hevur verið upp á tal ymsastaðni. – Eg vóni, at eg kann verða aftur í einum venjarastarvi í summar. Eg veit ikki, hvar tað verður, men eg haldi allar møguleikar opnar, og tí vil eg heldur ikki vísa aftur, at tað verður í útlandinum, sigur Roy Keane.

## Aston Villa missir takið

Aston Villa hevur í ár blandað seg upp í stríðið millum fýra tey fremstu í ensku Premier League, men nú er felagið úr Birmingham við at dragna í toppinum. Aston Villa tapti um vikuskiftið, og fyri fyrstu ferð síðani í desember mánaði er Aston Villa ikki millum fýra tey fremstu feløgini í Onglandi. Tað hevur stóran týdning at vera millum tey fýra fremstu, tí tað gevur rætt til at spæla í Champions League.

# Liverpool eyðmýkti United

**Manchester United upplivdi eitt søguligt skrædl á heimavølli leygardagin, og sjáldan hevur verið so kvirt á Old Trafford. Stóri syndarin hjá United var Nemanja Vidic**

PREMIER LEAGUE
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Steven Gerrard og Fernando Torres vístu sítt virði, tá Liverpool leygardagin eyðmýkti Manchester United á Old Trafford*
*Mynd: AP*

Tvey tey best umtóktu liðini í Onglandi, Føroyum og í mongum øðrum londum, Manchester United og Liverpool, spældu seinna Premier League-dystin sínamillum á Old Trafford leygardagin. Lagt var upp til ein javnan dyst, har United kanska var ein lítil favorittur, tí teir vóru á heimavølli.

Men tá leyst og liðugt var, sást einki til hetta. Liverpool vann 4-1, sum er størsta tapið hjá Manchester United á heimavølli, í søguni hjá Premier League, sum byrjaði í 1992. Tapið er tað størsta, Manchester United hevur havt ímóti Liverpool síðani 1936, tá Liverpool vann 5-2.

### United byrjaði best

Fyrstu løtuna av fyrra hálvleiki var tað tó United, sum var best, og tá hálvleikurin var hálvrunnin fekk heimaliðið brotsspark. Ji-Sung Park elti ein bólt inni í brotsteiginum, Liverpool-málverjin, José Reina kom út, og hann feldi Park. Dómarin var ivaleysur, og peikaði á brotssparksblettin. Cristiano Ronaldo var ísakaldur, og setti bóltin í netið til 1-0.

Men Liverpool misti ikki mótið. Tað er ikki nógv, sum Liverpool- og United-viðhaldsfólk kunnu semjast um, men tað er so breið semja um, at United-verjuspælarin, Nemanja Vidic, spældi sín ringasta dyst fyri United leygardagin.

Tá 27 minuttir vóru farnir, slapp hann at kenna hvussu vandamikil Liverpool-framherjin, Fernando Torres, er. Torres tók bóltin frá Vidic, sum ikki hevði hóming av, hvat hann skuldi gera við bóltin. Einsamallur við Edwin van der Sar, var Torres tryggleikin sjálvur, og javnaði til 1-1.

Beint fyri steðgin var liðskiparin, Steven Gerrard, feldur av Patrice Evra í United-brotsteiginum. Heldur ikki hesaferð var dómarin í iva. Steven Gerrard átók sær sjálvur at skjóta, og legði Liverpool á odda 2-1.

### Syndarin Vidic

United trýsti nógv eftir steðgin, og teir pumpaðu nógvar bóltar inn í brotsteigin, sum Liverpool-verjan beindi burtur. Nakrir málmøguleikar vóru til heimaliðið, men teir tóku ikki av, og Liverpool vaks alsamt í trúnni.

Tá 76 minuttir vóru farnir tekur Nemanja Vidic og jarðleggur Steven Gerrard, og ger ilt verri við at gestikulera, at har einki áfatt. Men Steven Gerrard var í fríari álopsstøðu, og tí mátti dómarin reka Vidic av vølli, og døma fríspark til Liverpool. Hesum tók brasilski Fabio Aurelio sær av og skjeyt eitt so væl plaserað fríspark inn í handara hornið, at van der Sar bert kundi vera eygleiðari. 1-3, og risafrøi á Liverpool-spælarum og -áskoðarum.

United-venjarin, Alex Ferguson, hevði stutt áðrenn sent Ryan Giggs, Paul Scholes og Dimitar Berbatov inn á vøllin fyri at tryggja United tað eina stigið. Men 10 ímóti 11 og tvey mál aftanfyri var ov brøtt brekka hjá United. Ronaldo kundi tó havt skorað til 2-3, men heilkiksaði. Og ógvuliga sigandi um dystin, so lobbaði innskifti Liverpool-spælarin Andrea Dossena – beint aftaná møguleikan hjá Ronaldo – bóltin upp um van der Sar til 1-4, beint aftaná.

Og tá dómarin bríkslaði, mundu fleiri Liverpool- enn United-viðhaldsfólk vera eftir á áskoðaraplássunum. Ein uppiborin sigur til Liverpool, sum vardi væl og var effektivt. United er tó enn fýra stig framman fyri Chelsea og Liverpool, og hevur enn ein dyst til góðar.

| Premier League | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
| 1 Man Utd | 28 | 20 | - | 5 | - | 3 | 49 | 16 | 33 | 65 |
| 2 Chelsea | 29 | 18 | - | 7 | - | 4 | 49 | 16 | 33 | 61 |
| 3 Liverpool | 29 | 17 | - | 10 | - | 2 | 49 | 21 | 28 | 61 |
| 4 Arsenal | 29 | 14 | - | 10 | - | 5 | 45 | 26 | 19 | 52 |
| 5 Aston Villa | 29 | 15 | - | 7 | - | 7 | 43 | 31 | 12 | 52 |
| 6 Everton | 29 | 13 | - | 9 | - | 7 | 39 | 29 | 10 | 48 |
| 7 West Ham | 28 | 11 | - | 6 | - | 11 | 34 | 34 | 0 | 39 |
| 8 Wigan | 29 | 10 | - | 8 | - | 11 | 29 | 28 | 1 | 38 |
| 9 Fulham | 29 | 9 | - | 10 | - | 10 | 28 | 26 | 2 | 37 |
| 10 Man City | 29 | 10 | - | 5 | - | 14 | 45 | 37 | 8 | 35 |
| 11 Tottenham | 29 | 9 | - | 8 | - | 12 | 35 | 34 | 1 | 35 |
| 12 Bolton | 29 | 10 | - | 3 | - | 16 | 31 | 43 | -12 | 33 |
| 13 Hull | 29 | 8 | - | 9 | - | 12 | 35 | 51 | -16 | 33 |
| 14 Sunderland | 29 | 8 | - | 8 | - | 13 | 29 | 38 | -9 | 32 |
| 15 Blackburn | 29 | 7 | - | 9 | - | 13 | 32 | 48 | -16 | 30 |
| 16 Newcastle | 29 | 6 | - | 11 | - | 12 | 35 | 46 | -11 | 29 |
| 17 Portsmouth | 28 | 7 | - | 8 | - | 13 | 30 | 45 | -15 | 29 |
| 18 Stoke | 29 | 7 | - | 8 | - | 14 | 28 | 47 | -19 | 29 |
| 19 Middlesbr. | 29 | 6 | - | 9 | - | 14 | 21 | 41 | -20 | 27 |
| 20 WBA | 28 | 6 | - | 4 | - | 18 | 25 | 54 | -29 | 22 |

# Chelsea og Arsenal tóku av

**Londonliðini gagnnýttu ósigrarnar hjá kappingarneytunum og fluttu hvør sítt pláss upp á stigatalvuni**

PREMIER LEAGUE
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Chelsea tók ímóti Manchester City á Stamford Bridge í einum dysti, sum var eyknevndur »uppgerðin hjá millióningunum«. Chelsea hevur tó eina munandi størri kontu, tá talan er um stig, og tann munurin øktist enn meiri, tí London-liðið vann uppgerðina við einum máli ímóti ongum.

Chelsea byrjaði væl, og hevði bóltin í City-netinum beinavegin, men málið var kolldømt, orsakað av rangstøðu.

Men eitt korter seinni fall málið, sum var nóg mikið hjá Chelsea til at vinna dystin. Frank Lampard sendi eitt fríspark væl innfyri, og ghanesiski framherjin, Michael Essien, fluktaði bóltin í málið hjá Shay Given.

Restina av dystinum var tað Chelsea, sum hevði teir stóru málmøguleikarnar, men Manchester City slapp væl við 1-0.

### Arsenal er komið í gongd

Arsenal er komið fyri seg síðstu umførini, eftir at málturkur hevur darvað The Gunners í oddastríðnum. Nú er gongd komin á, og móti Blackburn leygardagin líkaði tað heimafólkinum, at Andrej Arshavin longu í øðrum minutti trýsti fyrsta málið ígjøgnum – sjálvt um Andre Ooijer hjá Blackburn helst fær tað við í síni hagtøl sum sjálvmál.

Eftir hetta megnaði Blackburn tó at halda málið reint í yvir ein tíma, áðrenn tað skrædnaði. Tá 65 minuttir vóru farnir, gjørdi Andrej Arshavin tað til 2-0 – hesa ferð uttan iva um málskjúttan – og Emmanuel Eboue staðfesti sigurin hjá Arsenal við tveimum málum ímóti dystarenda, tað seinna við brotssparki.